

## Hans Eiler Hammer prædikar

Gudstænasta verður í Christianskirkjuni Norðoyastevnudag klokkan 11.00, og verður tað aftur í ár Hans Eiler Hammer, sóknarprestur, sum fer at prædika. Eisini fer KFUM og K kórið at syngja undir gudstænastuni.

Umframt vanligu gudstænastuna sunnumorgunin, verður eisini ein ungdómsgudtænasta í Christianskirkjuni. Henda gudstænastan verður fríggjakvøldið frá klokkan 20.00 til 22.00. Har kemur kórið United Voices eisini at luttaka.

Poul Færø, trúboðari í Føroyum:

# – Týdningurin at koma saman hevur altíð verið stórur



*– Familjuhugnin er altíð hitt sanna hátíðarhaldið, heldur Poul Færø*

**Í 1957 flutti Poul Færø til Klaksvíkar, og hevur hann búleikast her síðani. Poul er í dag ein virkin trúboðari, sum fólk kring alt landið munnu kennast við. Sosialurin hevur hitt Poul til eitt prát um stevnur fyrr og nú, og um hvønn týdning tey andaligu virðini hava á eini stevnu**

STEVNUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Tá Poul Færø í mai mánaði 1957 flutti til Klaksvíkar, var Norðoyastevnan merkt av siðsøguligum fyribrøgdum. Har vóru øll tey sløgini av lívsvirðum, sum tá í tíðini sermerktu tað dagliga lívið, framsýnd. Bæði við lutum og fólki, sum vóru íklødd eftir tátíðar hátti til øll tey ymisku endamálini.

– Ein hugtakandi framsýning undir fríum lofti. Hon lyfti stevnuendamálið upp, og gav okkum yngru smakkin av, at tað, sum vit vóru, var vunnið okkum við tógvum stríðið av undanfarnu ættarliðum, greiðir Poul frá.

### Andaliga saman við tí verðsliga

Tað at koma saman, hevur altíð havt stóran týdning fyri føroyingin, heldur Poul.

Helst orsakað av, at fólkið fyrr livdi so avbyrgt, og at ferðamøguleikarnir vóru serstakliga vánaligir.

Tískil komu fólkafundirnir, sum tá vóru hildnir, at draga fólkið til sín. Hetta var eitt gott høvi at hitta vinir og kenningar, at práta saman, frætta tíðindi og møguliga eisini at finna sær ein maka.

Harafturat kom so eisini møguleikin til at hoyra boðskapin á fundunum. Bæði um politisk og andalig evni, um álvara og gaman.

Hesir fundir drógu fólk til sín, og oftani høvdu teir andaligar røtur. Við hesum kom tað verðsliga lívið, sum jú var gerandisdagurin, at verða knýttur at hinum andaliga.

– So tá andaligir fundir vóru hildnir, serliga í Vágstúni, var eins stór mannamúgva hjástødd, sum tað vanliga var til ein fólkafund, greiðir Poul frá.

### Stór broyting

Hesir fólkafundir eru at líkna við stevnurnar í dag, men er her, hóast alt, ein stór broyting farin fram.

– Eins og úti í heimi, hevur ein peningaheimur sett merkið sítt á alt fyritakssemi her í Føroyum, heldur Poul Færø.

Hann heldur, at stóra ynski eftir at vinna pening, hevur í hansara tíð broytt stevnurnar í ein stóran mun.

– Stevnurnar í dag eru á tremur av tiltøkum av ymsum slag. Og her er flest øll tiltøkini av slíkum slag, har endamálið bert er at fremja brøgd og skapa kapping, heldur Poul.

Eisini heldur hann, at munurin á tí andaliga og tí verðsliga er nógv broyttur gjøgnum árini.

Tá í tíðini lá alt tað verðsliga meiri á somu linju sum tað andaliga, hóast ein greið linja altíð var ímillum.

– Í dag tykist eingin munur vera ímillum andaligt og verðsligt. Til dømis veitst tú ikki, um tað, ið sungið verður, er andaligt ella verðsligt. Rytman er jú hin sama, og hátturin at útinna er hin sami, sigur Poul.

– Men hetta er bert mín meting. Tey ungu í dag síggja uttan iva øðrvísi uppá hetta, leggur hann afturat.

### Familjuhugnin í hásætið

Stevnur kring landið leggja ofta stóran dent á undirhald til børnini og tey ungu, og verður sjáldan nógv pláss sett av til familjuhugna.

Hetta heldur Poul Færø er ein keðilig vend, tí eftir hansara tykki er familjuhugnin altíð hitt sanna hátíðarhaldið.

– Sum foreldur eru vit farin frá at vera framjandi til heldur at verða undirhaldandi. Undirhald er slagorðið, sigur hann.

Men hann greiðir víðari frá, at vit tíanbetur eru við at vakna frá hesum í dag.

– Fruktirnar av hesum undirhaldi eru skelkandi, bæði andaliga og verðsliga. Tað var ongantíð endamálið við lívinum bert at njóta. Vit skulu heldur verða viðvirkjandi í øllum, heldur Poul.










